

# Effo søkir KT-leiðara

Effo sóknast eftir einum dugnaligum KT-leiðara við drúgvum royndum. Sum KT-leiðari kemur tú at standa á odda fyri øllum KT-økinum hjá Effo-samtakinum. Tú fært evstu rakstrarligu ábyrgd av okkara KT-skipanum, og tú verður partur av krevjandi verkætlanum, sum standa fyri framman.

**Arbeiði umfatar m.a. at:**
Sum KT-leiðari hevur tú fjølbroyttan dag og verður við til at:

- Menna KT økið, so arbeiðsgongdir og skipanir á best gjørligan hátt stuðla dagliga arbeiðnum hjá starvsfólki okkara
- Verða partur av KT-verkætlanum
- Menna, reka og viðlíkahalda KT-skipanir
- Samskipa raksturin av KT-kervinum
- Syrgja fyri, at KT kervið altíð er væl tryggjað

**Deildin**
Tú kemur at leiða KT-deildina á høvuðsskrivstovuni á Óðinshædd í Tórshavn, sum er partur av fíggjar-deildini hjá Pf. Effo. Deildin hevur í løtuni ein KT-umsitara, sum tú fært starvsfólkaábyrgd fyri. Tú verður partur av leiðslutoyminum á fíggjardeildini.

**Tínir førleikar**
Tú dugir av øllum at leiða eitt arbeiði, hevur álit millum fólk, virðir tey og fært tey við tær. Tú hevur ein eldhuga fyri krevjandi avbjóðingum, snávar ikki í skeivari løtu og missir ikki málið úr eygsjón. Tær dámar eisini væl at fara undir nýggjar og nýmótans mannagongdir og hevur treiskni og dugnaskap til at fullføra tær.

Tú hevur KT-útbúgving og/ella arbeiðsroyndir til at greiða yrkisliga partin av arbeiðinum. Hægri útbúgv-ing er ein fyrimunur. Orðið er ein av tínum styrkjum , bæði skrivliga og munnliga, og enskt dugir tú . Kunnleiki til Navision Attain / Financials er ein fyrimunur.

**Vit bjóða tær**
Vit kunnu bjóða tær eitt sera spennandi og fjøltáttað starv, í einum nýggjum og framkomnum umhvørvi, har KT-økið verður raðfest sera frammarlaga. Starvið gevur tær góðar møguleikar fyri persónligari og yrkisligari menning. Tær stendur eisini í boði at vera við á skeiðum innanlands sum uttanlands. Vit bjóða kappingarføra løn, sum verður ásett eftir royndum og útbúgving. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

Fleiri upplýsingar fáast við at seta seg í samband við Sverra Kallsberg, fíggjarleiðara, tlf. 34 35 00.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera okkum í hendi **í seinasta lagi 12. februar 2010**. Umsóknin skal sendast til:

**Pf. Effo**
**Postboks 3098**
**110 Tórshavn**
**Frámerki: "KT-leiðari"**

ella sum teldupostur til **ska@effo.fo**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Stutt um Effo-samtakið**
Effo veitur orku til føroysk húsarhald, virkir og stovnar umframt til føroysk og útlendsk skip í Føroyum. Felagið eigur stóra terminalin í Fuglafirði, Effo Bunkers, har skip úr øllum heiminum bunkra. Somuleiðis veitir felagið føroyskum og útlendskum skipum oljuúrdráttir í útlendskum havnum og á høvunum. 14 bensinsølustøð eru í okkara kervið. Í dag arbeiða uml. 200 starvsfólk undir Effo-merkinum, har høvuðsskrivstovan er á Óðinshædd í Tórshavn.

føroya orkufelag

**Effo** Postboks 3098 110 Tórshavn Tel +298 34 35 00 www.effo.fo

---

Tekna teg sum haldara nú fyri einans

**495,- um ársfjórðingin**

**Sparið 560,- í mun til leysasølu!**



nær sum helst, hvar sum helst

**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent ópostað. Sosialurin rindar postgjaldið

64

Navn:

Bústaður:

Bygd / býur:

Telefon:

Undirskrift:

Sosialurin Boks 76 · FO-110 Tórshavn

---

## Málningur av Ingálv av Reyni

Málningur av Ingálvi frá 1964, stødd: 114 x 84 cm., til sølu um hóskandi boð fæst.

**Bill.mrk. 040210-001**

---




W W W . S O S I A L U R I N . F O